# Alpha Travel

Alpha Travel er ein ferðaskrivstova á eystaru bryggju í Havnini. Ferðaskrivstovan sá fyrstu ferð dagsins ljós tann 1. januar 2005, og hon hevur seks fólk í arbeiði.

Alpha Travel er ein vinnulig ferðaskrivstova, sum tekur sær av tørvinum hjá fyritøkum, stovnum og reiðaríum bæði í Føroyum og uttanlands.

Alpha Travel hevur eisini góðar avtalur við bæði flogfeløg og gistingarhús runt um í heiminum.

- Vit hava avtalur við 126 flogfeløg runt um í heiminum, og vit kunnu bjóða fleiri enn 44.000 gistingarhús fram í øllum heiminum, sigur stjórin á Alpha Travel, Tommy Næs Djurhuus.

Alpha Travel hevur eisini ein stóran part av føroyska skipaflotanum undir sær, umframt onnur skip úti í heimi.

- Vit hava ein stóran part av føroyska skipaflotanum undir okkum, har vit flyta skipsmanningar til og frá teimum ymisku skipunum. Vit hava tó eisini fleiri onnur skip undir okkum, og tilsamans hava vit manningaskifti til fleiri skip, enn tað finnast í føroyska skipaflotanum, sigur Tommy Næs Djurhuus at enda.



*Alpha Travel er ein vinnulig ferðaskrivstova, sum tekur sær av tørvinum hjá fyritøkum, stovnum og reiðaríum bæði í Føroyum og uttanlands*



















